# Sámal sparkaði ongantíð bóltin

**Hjalgrím Elttør er 76. spælarin, sum hevur umboðað Føroyar í 79 altjóða skrásettum landsdystum**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Vanliga leiktíðin var um at vera farin, tá føroyski landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, framdi fjórðu og síðstu útskiftingina. Í undankappingardystum er bara loyvt at skifta tríggjar útispælarar út og so málverjan. Í venjingardystum gera venjararnir avtalur um, hvussu tað skal verða við útskiftingunum.

Sámal Joensen stóð og trippaði á síðulinjuni eina løtu, áðrenn høvið var at skifta hann inn. Føroyski málskjúttin, Rógvi Jacobsen, fór av vøllinum. Eftir útskiftingina megnaði sekundvísarin ikki at fara eina ferð runt, áðrenn kypriotiski dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð. Í føroyska ferðalagnum siga teir, at Sámal Joensen ongantíð kom í nánd av bóltinum.

– Tað var tí, at eingin tykkara vildi spæla bóltin til mín, svaraði Sámal Joensen aftur. Tað er ongantíð áður komið fyri, at ein spælari hevur verið so stutt á vøllinum, sum Sámal var hesa ferð. Men tað man miðvallar stríðsmaðurin úr Gøtu leggja vertin í. Meiri hugaligt var tað, at hann aftur slapp at royna seg á landsliðnum. Hetta var 23. landsdysturin hjá Sámali Joensen, sum orsaka av drúgva skaðasteðginum í fjør ikki var á landsliðnum eftir summarfrítíðina.

### Hjalgrím og Rógvi

Hjalgrím Elttør úr KÍ sneytaði fleiri ferðir í fjør til landsliðið. Hann var við niðri í Jugoslavia 15. august, og síðani var hann fleiri ferðir á beinkinum. Sunnukvøldið loysti hann síðstu fimm minuttirnar Jákup á Borg av. Hjalgrím Elttør er 76. føroyski landsliðsspælarin, ið hevur roynt seg í teimum 79 altjóða skrásettu landsdystunum, sum Føroyar hava spælt.

Í teimum 79 dystunum hava Føroyar skorað 47 mál. Ein grikki gjørdi sjálvmál á Svangaskarði í 1994. Hini 46 málini hava føroyingar sjálvir skorað, og Rógvi Jacobsen er tann átjandi málskjúttin. Hinir eru Todi Jónsson (9), Uni Arge (7), Jan Allan Müller (4), Jens Kristian Hansen, Kurt Mørkøre og John Petersen (3), Øssur Hansen, Henning Jarnskor, Torkil Nielsen, Jens Erik Rasmussen og Kári Reynheim (2), Jan C. Dam, Hans Fróði Hansen, Óli Johannesen, Julian Johnsson, Christian Høgni Jacobsen og Allan Mørkøre (1).

### Jens Martin hóttir Allan

Hóast hann ikki var við ímóti Póllandi, og hóast hann heldur ikki verður við í morgin ímóti Liktinstein, so verður Óli Johannesen í annaðkvøld framvegis tann føroyingurin, sum fer at hava spælt flestar altjóða skrásettu landsdystirnar. Hann hevur spælt 55 landsdystir.

Allan Mørkøre er næstovastur. Hann hevur spælt 54 landsdystir. Jens Martin Knudsen var leingi tann, sum hevði spælt flestu landsdystirnar. Eftir dystin ímóti Póllandi hevur Jens Martin Knudsen vart føroyska málið í 53 dystum, og í annað kvøld fer hann aftur at leggja upp á síðuna av Allani Mørkøre.

### Hollendska toto-deildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 22 | 14 - 6 - 2 | 51 | 19 | 32 | 48 |
| 2 | VVV | 22 | 8 - 2 -12 | 39 | 42 | -3 | 26 |
| 3 | Top/Oss | 22 | 3 - 3 -16 | 17 | 67 | -50 | 12 |
| 4 | Storm/Telstar | 21 | 5 - 7 - 9 | 29 | 29 | 0 | 22 |
| 5 | RBC Roo'daal | 22 | 12 - 5 - 5 | 47 | 26 | 21 | 41 |
| 6 | MVV | 21 | 5 - 5 -11 | 29 | 39 | -10 | 20 |
| 7 | Heracles A. | 22 | 7 - 4 -11 | 29 | 33 | -4 | 25 |
| 8 | Helmond Sp. | 22 | 6 - 8 - 8 | 23 | 31 | -8 | 26 |
| 9 | Haarlem | 22 | 8 - 6 - 8 | 27 | 30 | -3 | 30 |
| 10 | G.A. Eagles | 22 | 6 - 7 - 9 | 31 | 40 | -9 | 25 |
| 11 | FC Zwolle | 22 | 13 - 5 - 4 | 37 | 25 | 12 | 44 |
| 12 | FC Volendam | 22 | 9 - 4 - 9 | 40 | 32 | 8 | 31 |
| 13 | Emmen | 22 | 12 - 6 - 4 | 37 | 22 | 15 | 42 |
| 14 | Eindhoven | 22 | 2 - 5 -15 | 24 | 57 | -33 | 11 |
| 15 | Dordrecht '90 | 21 | 8 - 6 - 7 | 41 | 33 | 8 | 30 |
| 16 | Cambuur/L. + | 22 | 10 - 5 - 7 | 33 | 25 | 8 | 35 |
| 17 | BV Veendam | 21 | 9 - 6 - 6 | 36 | 32 | 4 | 33 |
| 18 | ADO Den Haag | 22 | 11 - 6 - 5 | 34 | 22 | 12 | 39 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

### Enska 3. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 32 | 20 - 7 - 5 | 46 | 23 | 23 | 67 |
| 2 | Luton | 31 | 17 - 6 - 8 | 59 | 39 | 20 | 57 |
| 3 | Rochdale | 32 | 15 - 10 - 7 | 46 | 46 | 0 | 55 |
| 4 | Mansfield | 30 | 16 - 6 - 8 | 46 | 30 | 16 | 54 |
| 5 | Hull C. | 33 | 15 - 9 - 9 | 47 | 33 | 14 | 54 |
| 6 | Scunthorpe | 32 | 13 - 10 - 9 | 57 | 40 | 17 | 49 |
| 7 | Shrewsbury | 33 | 13 - 9 -11 | 47 | 42 | 5 | 48 |
| 8 | R&D | 33 | 13 - 9 -11 | 43 | 41 | 2 | 48 |
| 9 | Cheltenham | 29 | 12 - 11 - 6 | 42 | 34 | 8 | 47 |
| 10 | Kidderm. | 30 | 13 - 7 -10 | 38 | 30 | 8 | 46 |
| 11 | Hartlepool | 30 | 12 - 7 -11 | 46 | 33 | 13 | 43 |
| 12 | Darlington | 31 | 11 - 8 -12 | 41 | 44 | -3 | 41 |
| 13 | Exeter | 31 | 11 - 8 -12 | 33 | 48 | -15 | 41 |
| 14 | Southend | 31 | 11 - 7 -13 | 36 | 35 | 1 | 40 |
| 15 | Bristol R. | 30 | 10 - 8 -12 | 31 | 34 | -3 | 38 |
| 16 | Oxford Utd. | 33 | 8 - 11 -14 | 40 | 44 | -4 | 35 |
| 17 | Lincoln C. | 30 | 8 - 11 -11 | 31 | 39 | -8 | 35 |
| 18 | Swansea | 32 | 8 - 9 -15 | 37 | 49 | -12 | 33 |
| 19 | Macclesfield | 31 | 8 - 9 -14 | 27 | 39 | -12 | 33 |
| 20 | Leyton O. | 30 | 8 - 8 -14 | 42 | 54 | -12 | 32 |
| 21 | Carlisle | 30 | 7 - 11 -12 | 27 | 39 | -12 | 32 |
| 22 | York | 29 | 8 - 7 -14 | 35 | 51 | -16 | 31 |
| 23 | Torquay | 32 | 7 - 10 -15 | 29 | 50 | -21 | 31 |
| 24 | Halifax | 31 | 5 - 10 -16 | 22 | 49 | -27 | 25 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

# Jákup er í harðari kapping

**Higartil hava Jákup Mikkelsen og Eddie Gustafsson vart Molde málið í tveimum dystum í part**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Meðan liðfelagarnir á landsliðnum eru á Kypros, har tveir landsdystir eru á skránni, stríðist landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, fyri at varðveita plássið millum stólparnar hjá Molde í norsku tippuliguni. Og stríðið er eirindarleyst.

Higartil hevur Molde spælt fýra venjingardystir. Jákup Mikkelsen hevur verið málverji í tveimum, og Eddie Gustafsson, svenski málverjin, sum Molde keypti síðsta heyst, hevur verið málverji í tveimum dystum.

Svenskarin vardi málið í fyrsta venjingardystinum, sum var í Spania 26. januar. Mótstøðuliðið var Lillestrøm, og úrslitið var 1–1. Jákup Mikkelsen var málverji í næsta dystinum, sum varð spældur 30. januar. Tá var mótstøðuliðið Malaga, og úrslitið í Spania var 0–0.

Hósdagin 7. februar spældi Molde í Vestlands høllini ímóti Brann úr Bergen. Úrslitið var 3–1 til Molde, og Eddie Gustafsson var málverji. Fríggjadagin 8. februar hvíldu fleiri av bestu spælarunum seg. Tá var mótstøðuliðið Hødd. Úrslitið var 3–3. Jákup Mikkelsen vardi Molde málið, og á liðnum vóru fleiri heilt ungir spælarar.

Higartil hava Jákup Mikkelsen og Eddie Gustafsson verið málverjar aðru hvørja ferð. Tað vil siga, at Molde venjarin, Gunde Bengtsson, tykist ikki enn hava tikið støðu til hvønn av málverjunum, hann í fyrstu atløgu ætlar sær at hava sum aftasta álit á besta liðnum.

# Nú gongur undan hjá Hull

**Julian Johnsson og liðfelagarnir styrktu leygardagin um sína støðu í stríðnum um at flyta upp**

ONGLAND
*Jóannes Hansen*

Brian Little, venjarin hjá Hull City og Juliani Johnsson, sum hevur roynt so nógv í sínum venjaraarbeiði, var leygardagin sera fegin, tá hann í sólskininum fór úr Boothferry Park, sum er heimavøllurin hjá Hull City.

Og hann hevði saman við teimum flestu av teimum 8.825 áskoðarunum alla orsøk at vera í góðum lagi. Julian Johnasson og liðfelagarnir høvdu vunnið trý týdningarmikil stig. Harvið styrktu teir um sína støðu í kappingini um triði fremsta plássið og møguleikan fyri uppflyting.

– Vit spældu so mikið væl, at vit høvdu uppiborið at vinna, segði venjarin, sum síðstu løtuna saman við felstu áskoðarunum var á pínubeinkinum.

– At teir fáa brotsspark og minka um munin til 2–1 er púra við síðuna av. Støðan hevði einki við brotsspark at gera. Og var talan ikki um brotsspark, so hevði australski spælarin hjá okkum, Jason Van Black, ikki fingið seinna gula kortið, og so høvdu vit ikki verið undirmannaðir síðstu trettan minuttirnar, staðfesti Brian Little.

Venjarin segði seg vera ivaleysan í, at liðið hjá honum í 1. hálvleiki varð snýtt fyri eitt sólarklárt brotsspark, sum bæði dómarin og linjuverjin áttu at havt sæð.

Julian Johnsson var á vøllinum allar 90 minuttirnar, og venjarin rósti honum fyri at hava stríðst sera væl.

Gestirnir úr Rushden and Diamonds løgdu bragdliga fyri. Teir høvdu einstakar góðar møguleikar, men tað var heimaliðið, sum kom á odda, tá tólv minuttir vóru farnir. Tað restaðu tjúgu minuttir, tá Hull City økti til 2–0. So var tað, at gestandi liðið fekk brotsspark, og trettan teir síðstu minuttirnar var tað meiri spennandi, enn tey í Hull bríggjaðu seg um, men tað gekk, og so vóru Brian Little og øll hini viðhaldsfólkini hjá Hull so sera fegin!

**jh**

# Taptu uttan Súna

Zwolle misti eitt sera týdningarmikið fet í oddastríðnum, tá teir á heimavølli taptu 2-0 fyri VVV.

Súni Olsen var ikki við í hópinum, sum hóast eina góða byrjan í dystinum ikki fekk nakra úrtøku framman fyri málinum. Á hálva tímanum eydnaðist ístaðin gestunum at leggja seg á odda, og stutt eftir øktu teir til 2-0.

Zwolle royndi, sum vera man, at trýsta, tað sum eftir var av dystinum, men veruliga vandamikið gjørdist tað ongantíð, og so var fyrsta tapið í nýggja árinum veruleiki.

Tapið viðførdi, at VVV tókm seg fram um Zwolle í oddastríðnum, har tað í løtuni er sera javnt. Ikki minst tí oddaliðið, Excelsoir eisini tapti sín dyst. Tapið hjá Excelsoir merkti annars, at um Zwolle hevði vunnið sín dyst, hevði bert eitt stig verið upp til bein leiðis uppflytingarsessin, men talan er altso framvegis um fýra stig.

**-jm**



# Talvstøður

### 1. Deild

KT - TFS 1.5-2.5
Hans K. Simonsen (2070) - Martin Brekká (2060) 1-0
Bernhard Thomsen (1980) - Finnbjørn Zachariasen (2050) 0-1
Eyðálvur Johannesen (1680) - Sámal Christiansen (1800) 0,5-0,5
Alvin Joensen (1640) - Bergur Magnussen (1735) 0-1

KTF - HT 2-2
Ólavur Simonsen (2215) - Flóvin T. Næs (2235) 0-1
Rani Nolsøe (2185) - Martin Poulsen (2090) 0-1
Steintór Rasmussen (2090) - Olaf Berg (2055) 1-0
Tummas M. Antoniussen (1965) - Herluf Hansen (2035) 1-0

VT - HT 2 4-0
IM John Rødgaard (2315) - Jóhan Gaard (1810) 1-0
Torbjørn Thomsen (2210) - Óli Joensen (1790) 1-0
John Jacobsen (1910) - Jóhan E. Hansen (1760) 1-0
Kári Durhuus (1745) - Jógvan Næs (1715) 1-0

Støðan eftir 8. umfar
1 KTF, Klaksvík 5-3-0 22,5
2 VT, Vestmanna 5-1-2 21,0
3 HT, Tórshavn 4-4-0 19,5
4 KT, Kollafjørður 2-2-4 13,0
5 TFS, Hvalvík 2-1-5 12,5
6 HT 2, Tórshavn 0-1-7 7,5

### 2. Deild

KTF 2 - VT 2 3.5-0,5
Finnbjørn Vang (1965) - Jákup á R. Andreasen (1655) 1-0
Ingolf Gaard (1745) - Jón Mikkelsen (1655) 1-0
Ebb F. Petersen (1215) - Joen Pauli Johannesen (1465) 0,5-0,5
Rani Tómasson (1185) - Niels O. Durhuus (1365) 1-0

ST - TT 1-3
Torkil Nielsen (2080) - Jens Kristian Hansen (2165) 0-1
Bernhard Augustinussen (1835) - Helgi Joensen (1740) 0,5-0,5
Jónfinn Thomsen (1795) - Wensil Højgaard (1730) 0-1
Gutti Petersen (1630) - Justines Hansen (1650) 0,5-0,5

GT - RT 2.5-1.5
John Joensen (1750) - Bjarki Ziska (1805) 0,5-0,5
Jákup F. Joensen (1715) - Brandur K. Jacobsen (1655) 1-0
Reinhold Isaksen (1710) - Henrik W. Joensen (1655) 1-0
Heri Thomsen (1375) - Eyðun Lamhauge (1645) 0-1

Støðan eftir 8. umfar
1 TT, Toftir 7-0-1 21,5
2 ST, Sandavágur 4-1-3 18,5
3 RT, Runavík 2-4-2 17,5
4 KTF 2, Klaksvík 3-0-5 14,0
5 GT, Gøta 2-1-5 12,0
6 VT 2, Vestmanna 2-2-4 11,5

### 3. Deild

VT 3 - ST 2 1-3
Jóhannus Johannesen (1105) - Rógvi Jacobsen (1755) 0-1
Rógvi Hansen (1075) - Magni Thomassen (1495) 1-0
John Martin Andreasen (1040) - Jóannes Ortind 0-1
Martin Jóanesarson - Ari Thomassen 0-1

HT 3 - KT 2 4-0
(KT møtti ikki – missa tískil 4 stig)

HT 4 - Rókur 3.5-0,5
Poul Poulsen (1720) - Petur Sumberg (1635) 1-0
Jóannes Guttensen (1585) - Árni M. Dam 1-0
Frants J. Eliassen (1470) - Karl M. S. Jensen (1315) 0,5-0,5
Herluf Mortensen (1325) - Pól Andreas Poulsen 1-0

Støðan eftir 8. umfar
1 HT 3, Tórshavn 6-2-0 24,5
2 HT 4, Tórshavn 5-0-3 19,5
3 ST 2, Sandavágur 5-1-2 18,5
4 Rókur, Oyri 3-0-5 11,5
5 VT 3, Vestmanna 0-1-7 8,0
6 KT 2, Kollafjørður 2-2-4 6,0

# Talvið hesa vikuna

**Olaf Berg (2055) — Steintór Rasmussen (2090)**
**FM Lið, 09.02.2002**

1.c4 Rif6 2.Ric3 g6 3.g3 Bg7 4.Bg2 e5 5.e4 0-0 6.Rige2 Ric6 7.d3 d6 8.f3 (tykist heldur passivt. Møguliga h3 er betri, við planini Be3, f4) Rih5 9.Be3 f5 10.Fd2 Rid4 11.0-0-0 c6 12.Rdf1 Rb8 13.h3 b5 (svartur hevur útjavnað, enntá stendur hann nakað betur) 14.g4 Rif4 (áhugaverdur og álopssinnaður leikur sum opnar fyri svarta bispinum. Tað trygga er Rixe2+, og síðani Rif6) 15.Rixf4 exf4 16.Bxf4 fxe4 17.fxe4 Rxf4! (flott kvalitetsoffur av Steintóri, sum er kendur fyri slíkar kombinatiónir) 18.Fxf4 bxc4 19.dxc4 Be6 20.h4 Bxc4 21.Rf2 (svartur hevur álop, meðan hvítur hevur bert eitt at gera, nevnliga at verja. Við neyvari verju, ber til hjá hvítum at bjarga sær, men sera torført er at finna besta leikin hvørja ferð í tílíkari opnari støðu) 21...Fa5 22.Fxd6 Be5 23.Fa3



Fc7 24.Fc5? [24.Bf1! og hvítur bjargar sær helst] 24...Bxa2! 25.Kd1 [25.Rixa2?? Rib3+] 25...Be6! (hvíta støðan hongur ikki saman) 26.Rhf1 Bxg4+ 27.Ke1 Rie6 28.Fc4 Bg3 29.Rid1 Fa5+ 30.Fc3

Rxb2!! 31.Bf3 [31.Fxa5 Re2#] 31...Bxf3 32.h5 Fa1(?) [32...Re2# mát! Steintór sá hetta tá hann leikti Rxb2, men tíverri fyri hann hevur hann helst gloymt hendan møguleika í hesum føri. Sjálvt góðir telvarar síggja onkuntíð ikki mát í ein. Talvið er tó kortini vunnið.] 33.Fxf3 Rxf2 34.Rxf2 Bxf2+ 35.Fxf2 Rid4 36.Ff6? Ric2+ og Olaf missur frúnna. Støðan var tó kortini tapt. Sera inspirerandi telving frá Steintóri, sum av álvara hevur førkað seg aftur ímóti elituni. 0-1

# Vestmenningar hála seg inn

**Vestmenningar gjørdu sær dælt av at klaksvíkingar og havnarmenn leiktu 2-2. Nú er bert hálvtannað stig millum KTF og VT**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Liðkappingin hevur útviklað seg til eitt stríð millum klaksvíkingar og vestmenningar um gullkrónurnar, har fyrst nevndu sjálvsagt hava bestu kortini við teirra stigarleiðslu. Men vestmenningar hava enn møguleikan, serliga í komandi umfari — hitt næstseinasta — tá toppdystur verður millum teir og klaksvíkingar. Enn er einki avgjørt.

### Toppdysturin

Havnarmenn mistu helst FM-møguleikan leygardagin, tá teir leiktu 2-2 ímóti toppliðnum úr Klaksvík. 2-2 er einki vánaligt úrslit, tvørturímóti, men skuldi FM-heitið endurvinnast, so var kravið ein sigur. Flóvin Tór Næs var heima og hjálpti barndómsfelagnum, og sjálvt um hann vann sítt talv ímóti Ólavi Simonsen, fingu havnarmenn bert tvey stig. Ólavur hevði helst møguleika at fáa javnt, men gjørdi avgerandi feil í endatalvinum - eins og Rani Nolsøe gjørdi ímóti Martini Poulsen á øðrum borði - og tapti.

Hinvegin bjargaðu Steintór Rasmussen og Tummas M. Anthoniussen stigini til klaksvíkar, við sigrum á Olaf Berg og Herlufi Hansen. Talvið sum Steintór vann, er í blaðnum í dag. Royndi klaksvíkingurin telvar sera frískt og álopssinnað, og tað gav úrslit.

Heini Olsen var hjástaddur sum áskoðari í Klaksvík (Heini hevur havt talvskúla fyri unglingar okkara sum umboða Føroyar í NM, sum verður í døgunum 14-16. februar í Danmark), men leikti ikki við oddaliðnum. Hetta ber brá um at klaksvíkingar veruliga hava sjálvsálit og halda síni orð. Teir høvdu nevnliga framanundan alment sagt, at teir ikki vildu styrkja liðið ímóti havnarmonnum. Klaksvíkingar vórðu tí bilsnir og eisini skuffaðir tá havnarmenn høvdu styrkt sær um liðið við Flóvini — uttan at nevna tað framanundan. Klaksvíkingar væntaðu ivaleyst eitt slag av einari gentleman agreement frá Havnar Telvingarfelag, eftirsum teir høvdu spælt út við opnum kortum undan dystinum.

### Endaspurtur í gongd

Í Vestmanna vann heimaliðið ein væntaðan 4-0 sigur ímóti HT 2. Bert Jóhan Gaard á HT 2 hevði møguleika at fáa okkurt stigið í talvinum ímóti IM John Rødgaard. Jóhan var ikki nóg kaldur, og Rødgaard tók sín kjans eftir hetta.

Vestmenningar tóku við hesum stórsigri eitt gott stev ímóti oddaliðnum, og eru teir einastu sum kunna bjóða klaksvíkingum av. Teir á HT 2 flyta nú við nærum vissu niður í 2. deild. Teir hava stríðst væl, men seinastu tvey umførini hava prógvað, at teir enn ikki eru til reiðar at leika í fremstu deildini.

Hvalvíkingar vunnu ein góðan 2,5 — 1,5 sigur á kollfirðingum sum viðførir at teir møguliga náa einum fjórða plássi og at niðurflyting bert í teoriini er møgulig.

Næstseinasta umfar verður 24. februar, og tá hittast HT2 - KT, KTF - VT og HT — TFS.

### 2. deild

Toppdysturin millum toftamenn og sandavágsmenn endaði við tryggum 3-1 sigri til fyrst nevndu. Klassiska uppgerðin millum Torkil Nielsen og Jens Kristian Hansen vann Jens Kristian, sum hevur havt góð úrslit í ár, og vinnur sær nøkur ratingstig aftrat sínum 2165. Tvey umfør resta í, men torført er at ímynda sær at Jens Kristian missur nøkur stig. Veteranuppgerðin millum Gutta Petersen og Jústines Hansen endaði jøvn.

Hinir dystirnir vóru; KTF2 - VT2: 3,5 — 0,5 og GT — RT 2,5 — 1,5. Toftamenn eru trý stig fremstir, og flyta allarhelst uppaftur í 1. deild.

Í 3. deild vann oddaliðið HT3 4-0 á kollfirðingum, og liggja klárt fremstir.

### NM unglingar

Fimm ungir telvarar — Hans K. Simonsen, Martin Poulsen, Olaf Berg, Rani Tómasson og Rógvi Mortensen - fáa komandi vikuskifti møguleikan at gera vart við seg, tá teir umboða Føroyar í Norðurlandameistaraheitinum fyri unglingar, sum verður leikt á Tjele Efterskole í Jútlandi 14-16. februar. Ferðaleiðari verður John Rødgaard.

Unglingar okkara hava fingið góða venjing frá útisetanum Heina Olsen, sum hevur verið heima og skipað fyri talvskúla.

Í næstu viku fer talvgreinin tískil at snúgva seg um vónandi góð úrslit hjá føroyingum.